## UTTAN ÚR HEIMI

## Minst 1000 trælir í Danmark

**Tað eru serliga eysturevropeiskar og asiatiskar kvinnur, sum verða noyddar at liva sum skøkjur**

DANMARK

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Evroparáðið, Amnesty International og Reyði Krossur siga í einari nýggjari frágreiðing, at fleiri milliónir fólk liva sum trælir kring heimin, at at minst 1.000 teirra eru í Danmark.

Danska løgreglan sigur, at í Danmark eru tað serliga eystur-evropeiskar og asiatiskar kvinnur, ið verða noyddar at arbeiða sum skøkjur, og sum liva undir trælakorum, skrivar Politiken.

Evroparáðið sigur tað vera ræðandi, at vit veruliga hava trælahald í Evropa í 21. øld, sjálvt um trælahald varð bannað fyri 150 árum síðani. Ráðið mælir sínum 45 limalondum til at geva teimum misnýttu kvinnunum betri atgongd til kreppumiðstøðir, heilivág, sálarliga hjálp og at tryggja teimum betri løgfrøðiliga ráðgeving.

Danska deildin hjá Reyða Krossi heldur ikki, at stjórnin hevur gjørt nóg mikið, men Bertel Haarder, ráðharri í innflytaramálum, sigur við Politiken, at hann er sinnaður at taka stig til at loysa trupulleikarnar.



*Amerikanararnir hava kringsett tann heilaga shiamuslimska býin Najaf, og eygleiðarar vænta blóðbað, herja amerikanararnir á býin*

Mynd: Reuters

# Stúra fyri blóðbaði í Najaf

**2500 amerikanskir hermenn hava kringsett irakska býin Najaf. Uppgáva teirra er at taka tann víðgongda shiamuslimska leiðaran Moqtada al-Sadr, og tað kann enda í einum blóðbaði**

IRAK

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Tann 31 ára gamli Moqtada al-Sadr skal takast ella beinast av vegnum, tí hansara menn hava beint fyri fleiri amerikonskum hermonnum, og sjálvur hevur hann eggjað irakum til at gera uppreistur ímóti hersetingarvaldinum.

Najaf er tann heilagi býurin hjá shiamuslimunum, og sjálvur heldur al-Sadr til í einum húsum tætt við ta stóru moskuna í býnum. Hjá sær hevur hann fleiri av sínum vápnaðu viðhaldsmonnum, og amerikanararnir eru tí greiðir yvir, at bardagin um býin kann gerast blóðugur.

- Vit eru greiðir yvir, at eitt einasta skot frá einum av okkara hermonnum kann elva til ruðuleika, sigur obersturin Dana Pittard, sum er ovasti hjá teimum 2500 amerikonsku hermonnunum, sum hava kringsett Najaf.

Moqtada al-Sadr hevur gjørt greitt, at hann fer ikki at geva seg yvir til amerikanararnar, og í gjár fekk hann stuðul frá fleiri leiðandi shiamuslimum, sum vissaðu hann um, at heldur ikki teir fara at gevast við bardaganum ímóti amerikonsku hermonnunum.

### USA skyldina

Fleiri serfrøðingar siga, at amerikanararnir hava sjálvir skyldina av, at ófriðurin í Irak hevur vundið so nógv upp á seg í seinastuni. Nawaf Tell, sum er professari á lærda háskúilanum í Jordan, sigur við Aftenposten, at USA hevur gjørt fleiri mistøk, sum hava elvt til, at irakar hava sett seg upp ímóti teimum amerikonsku hermonnunum.

- Hetta eru eisini irakar, sum fyrr styðjaðu USA. Hygg bara at Ahmed Chalabi, sum situr í stjórnarráðnum, og sum var ein av trúgvastu stuðlunum hjá USA. Í dag hellir hann meiri til teir shiamuslimskar leiðarar so sum Moqtada al-Sadr, sigur tann jordanski professarin.

Hann dugir ikki at siga, hvussu USA skal sleppa burtur úr knípuni, men hermegi loysir ikki trupulleikarnar, sigur hann.

# Ferja mundi stoytt saman við tveir kavbátar

**Álandsferjan "Roslagen" mundi stoytt saman við tveir kavbátar í síðstu viku. Finska sjóverjan veit ikki, hvørjir kavbátarnir vóru**

SIGLING

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Yvirmenninir á brúnni á "Roslagen" dugdu ikki at síggja nakað á sjónum, men á radaranum sóu teir eitt ella annað, ið var til støddar sum eitt tangaskip. Brádliga komu tveir kavbátar undan, skrivar blaðið Ålandstidningen.

Sambært blaðnum vóru teir báðir kavbátarnir bara nakrar fáar hundrað metrar frá ferjuni. Finska sjóverjan hevur staðfest, at kavbátarnir vóru hvørki finskir ella svenskir, men meiri veit hon ikki um teir.

Tað var stutt fyri klokkan sjey um kvøldið skírisdag, at yvirmenninir umborð á "Roslagen" varnaðust kavbátarnar á radaranum. Ferjan var tá stødd vestan fyri Signilskær í Álandshavinum. Skiparin, Johan Bertell, sigur við Ålandstidningen, at hann gjørdi av at taka frá og at snara skipinum, tá teir vóru minni enn ein fjórðing frá teimum báðum kavbátunum. Trygdarovastin hjá reiðarínum heldur, at ferjan var bara einar 300 metrar frá kavbátunum, áðrenn hon snaraði frá teimum.

Teir báðir kavbátarnir kavaðu stutt eftir. Finska sjóverjan sigur, at tilburðurin er sera álvarssamur. Hon heldur, at kavbátarnir kanska vóru russiskir, men enn hava finsku myndugleikarnir ikki spurt seg fyri í Moskva.



# LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

## Akfør

**BÍLIGA TIL SØLU**
Opel Astra st. car TD, árg. 95, sera økonomiskur og í góðum standi.
*Tlf. 333705/518805*

**FORD MONDEO 1.8 TD ST.CAR**
árg. 1998, km 105.000. Sera økonomiskur og rúmligur bilur verður seldur vegna flyting. Bilurin er í góðum standi. Ikki roykjarabilur. Airc., ABS, hiti í forrútinum, el-rútar framman, el-spegl v/ hita, innstilling av róðuri, el-innstilling av forlyktum, tokulyktir framman, tráðleyst centrallás, leðurróður. Sýnaður nov. 2002. Prísur: kr. 99.000
*Tlf. 271862/318474*

**FORD KA**
árg. 99 í góðum standi til sølu, koyrt 64.000 km.
*Tlf. 226004*

**TIL SØLU**
Honda Gold Wing GL 1000, árg. 12/1976, til sølu fyri 45.000 kr.
*Tlf. 424407/212407*

**SEAT CORDOBA SE 1.6**
árg. 05/97, marinebláur, 90.000 km, í sera góðum standi, til sølu vegna flyting, fyri uml. 70.000 kr.
*Tlf. 322133/229366*

**TIL SØLU**
Deilir til VW Golf árg. 88, 2 hurðar, 2 forskermar o.a. 2 hurðar til Nissan Sunny N13.
*Tlf. 448614/218614*

**SPORTFELGUR**
17" sportfelgur við góðum summardekkum 205/40 til sølu fyri 8.000 kr. Felgurnar hava 4 hol, passa m.a. til Peugeot 206-306-7.
*Tlf. 210118*

**VW GOLF 1.6**
aut. gear árg. 1989, nýsýnaður, 15" alufelgur, hvítur, fløguspælari og forsterkari, til sølu fyri 20.000,-
*Tlf. 312264 eftir kl. 17*

**MITSUBISHI SHOGUN (L 300)**
2,5 TD 4 x 4, árg. 89. Góðkendur til 4 persónar, nýsýnaður, prísuppskot 45.000 kr.
*Tlf. 225821 eftir kl. 19*

**HONDA CIVIC**
Svartur Honda Civic frá ´95 við 16"sportfelgum, sóltak og senkaður, bilurin sær væl út!
*Tlf. 226744*

**JAPANSKUR BILUR**
ynskist til keyps max. 19.000 kr. Má hava verið sýnaður, árg. 91-98.
*Tlf. 224910*

**EYKALUTIR**
til Ford Sierra árg. 88 til sølu.
*Tlf. 250133*

**EYKALUTIR**
til Toyota Corolla 1.3 árg. 88 til sølu.
*Tlf. 321088*

**COROLLA 1.3**
til sølu, árg. 92, nýsýnaður.
*Tlf. 511990*

**TIL SØLU**
4 alu-felgur 5 hol, 5 x 100 millum boltarnar, dekk 205/55-16. Passa til Carina E, Avensis. Sera bíliga til sølu.
*Tlf. 254266*

**HEILÁRSDEKK**
4 heilársdekk til sølu, stødd 185/70-14" - 2 mrk. gev boð.
*Tlf. 259335*

**TIL SØLU**
Mitsubishi Lancer frá 1987. Hevur plátur og koyrir fínt. Vælegnaður til eykalutir. Prísuppskot kr. 3000.
*Tlf. 757322*

**GÓÐ HEILÁRSDEKK**
175/65-14 til sølu fyri 1.000,- kr.
*Tlf. 250133*

**CITROEN BX 1.9 GTI**
frá 86, í góðum standi, manglar ein hondbremsukápil. Prísuppskot 12.000 kr.
*Tlf. 721882, Jóhann*

**TIL SØLU**
Silvurgráur Ford Escort st.car 1.8 TD, árg. aug. 98, hevur aircondition, el-rútar, el-spegl, hita í setrunum og forrútinum. Er í sera góðum standi.
*Tlf. 211444*

**OPEL ASTRA**
árg. 98 til sølu, koyrt 50.000 km.
*Tlf. 319699*

**MAZDA 323**
til sølu, árg. 91, nýsýnaður, 15" sportfelgur v/ heilársdekkum, sær væl út og er í góðum standi.
*Tlf. 256801*

**TOYOTA COROLLA**
árg. 89, koyrir av tí besta. Hevur powerstýring. Er brúktur til arbeiðsbil, selist vegna keyp av størri bili. Prísuppskot 5.000,-
*Tlf. 372805*

**TIL SØLU**
Nýggj dekk, ymiskar støddir.
*Tlf. 218778*

**TIL SØLU**
Nógvir eykalutir til Ford Escort st.car árg. 96.
*Tlf. 218778*

**TIL SØLU**
Opel Vectra árg. 08/97, 90.000 km hevur antispin, fjarstýrd sentrallás, summar- og píkadekk, spildurnýggj til sølu.
*Tlf. 259270*

**ALU-FELGUR TIL SØLU**
15" felgur, 4 hol, 115 mm millum hjulboltar. Prísur: 800 kr.
*Tlf. 224180*

**HEILÁRSDEKK**
Nýggj heilársdekk á orginalum felgum til Opel Astra til sølu. Stødd 165-70-13. kr. 1500.
*Tlf 318283. Mobil 223982*

**TOYOTA AVENSIS 1.8 TIL SØLU**
vegna keyp av minni bili, árg. mai 03, koyrt 10.000 km.
*Tlf. 222684*

**TIL SØLU**
Honda Civic, árg. 92, el-rútar, sentrallás, el-spegl, powerstýring, air-con, sportfelgur, 32.000 kr.
*Tlf. 267315*

**BMW TIL SØLU**
Grønur BMW 320 D, 167 HK, árg. 01.09.99 ikki innfluttur, til sølu.
*Tlf. 315511/223311*

**CAMP-LET**
teltvognur til sølu fyri kr. 4.000,-
*Tlf. 211102*

**SPORTFELGUR**
16" sportfelgur við 205/50 x 16 radialdekk, alt sær út sum nýtt, til sølu, hevur 4 hol,passar til Nissan Primera, er brúkt eitt summar. Áhugað ring
*tlf. 443096*

**OPEL OMEGA 1.8cc TIL SØLU**
sum eykalutir, koyrt 138.000 km, ring og gev eitt boð.
*Tlf. 503715*

**EYKALUTIR**
til Mazda, árg. 87, model BF, til sølu.
*Tlf. 503716*

**TIL SØLU**
Takboylar passa m.a. til Opel Astra, bíliga til sølu.
*Tlf. 253273/319888*

**HONDA ACORD**
uttan plátur til sølu fyri 3000 kr
*748446*

**ESCORT/MONDEO**
4 stk. alu felgur 15" við dekkum, 2 195x55x15, 2 205x50x15, til sølu fyri 4.500 kr.
*Tlf. 211745*

**SAAB 9-3**
árg. 27.7.99 til sølu um hóskandi boð fæst. Koyrt 65.000 km, er í sera góðum standi.
*Tlf. 509353*

**BMW 525 TDS**
Ein motorur til BMW 525 TDS til sølu. Hevur koyrt 250.000 km. Aðrir lutir til BMW E34 seriuna eisini til sølu.
*216409*

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: [1] [2] [3] [4] [5] ferðir
*(set X)* undir teiginum:

| | | |
|---|---|---|
| ❑ Akfør | ❑ Amboð | ❑ Arbeiði |
| ❑ Barnaansing | ❑ Barnaútgerð | ❑ Bátaútgerð |
| ❑ Bingo | ❑ Brævaskifti | ❑ Burturm./funnið |
| ❑ Býli | ❑ Bøkur | ❑ Dansur |
| ❑ Dýr | ❑ Fundir | ❑ Húsarhaldstól |
| ❑ Innbúgv | ❑ Lutaseðlar | ❑ Leikur |
| ❑ Matur | ❑ Pløgg | ❑ Samband |
| ❑ Súklur | ❑ Teldur | ❑ Tónleikur |
| ❑ Út-& sjónvarp | ❑ Ymiskt | ❑ .......................... |

***Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.***

Sent hevur:
Navn:………………………………………..
Bústaður:……………………………………
Bygd/býur:…………………………………..
Tlf.: ………....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

## Arbeiði

**FLYKRAN Í SMS**
Vit søkja eftir handilsfólki til klædnahandilin Flykran í SMS. Vinarliga ring
*tlf. 311683*

**ARBEIÐI YNSKIST**
Eg eri ein 23 ára gamal havnardrongur, ið gjarna vil hava eitt arbeiði. Eg havi koyrikort til persónbil og trukk, eg havi royndir innan alt vanligt arbeiði. Um nakar hevur brúk fyri mær, so ring á
*tlf. 509309 ella 317109*

**HEY!**
Vit eru tvær gentur, sum ætla at passa ein ella tveir hestar, tað skal vera í Havn.
*Ring 318578 ella 261412*

**REINGERINGSHJÁLP**
Søkt verður eftir reingeringshjálp eina ferð um vikuna.
*Tlf. 312619*

**SØKIR KJANS**
50 ára gamal íslendingar, sum býr í Føroyum, søkir kjans við føroyskum fiskiskipi, útróðrarbáti ella farmaskipi. Eg havi siglt í 30 ár, bæði við trolara, línuskipi og útróðrarbáti. Eg havi eisini siglt sum kokkur.
*Tlf. 503297*

## Barnaútgerð

**TVÍBURAVOGNUR TIL SØLU**
Av merkinum Trille v. lufthjulum, 2 lyftir v. heilsumadrassum, regnskjóli og fluguneti. Vognurin er 4 mðr gamal
*Tlf. 361411*

**BILBARNASTÓLUR**
2-6 ár til sølu fyri 300 kr.
*Tlf. 316535/219392*

**TVÍBURA KOYRISTÓLUR**
Ein tvíbura koyristólur við galesju, til sølu fyri 500 kr. Ein koyristólur við regnslagi fæst við at avheinta hann.
*Tlf. 313424/257187*

**CHICCO BILSTÓLUR**
0-10 kg. til sølu fyri 250 kr. Ammupúta (lítið brúkt) til sølu fyri 150 kr.
*Tlf. 311045*

**TIL SØLU**
Rullandi pusliborð 250 kr., tremmusong 300 kr., babysittari 50 kr.
*Tlf. 318032*

**KOMBIVOGNUR**
Myrkabláur Brio kombivognur til sølu fyri 1.000 kr. Puslitaska, regnslag og flugunet fylgir við.
*Tlf. 311327*

**BRIO KOYRISTÓLUR**
til sølu fyri 2800 kr. nýprísur er 4800 kr. Stólurin er næstan ikki brúktur. Hevur lufthjul og er myrkabláur.
*Tlf. 261166*

**EITT LAMBSSKINN**
til koyristól ella barnavogn til sølu fyri 200 kr.
*Tlf. 322850*

**KOYRISTÓLUR**
við kalesju til sølu fyri 1.000,- kr.
*Tlf. 322850*

**TIL SØLU**
Ein Roscane kombistólur v/ lufthjólum og koyriposa 1.800 kr. Ein tremmusong v. springmadrassu 400 kr.
*Tlf. 456053*

**BARNASONG**
1 1/2 ára gomul, nýprísur 1.300 krónur, nú bert 600 krónur. Í sera góðum standi, sum nýggj.
*Tlf. 742119*

**TREMMUSONG ÚR TRÆI**
65 x 130 cm. Botnurin kann flytast í 4 hæddum, síðupartí flytast upp og niður, stendur á hjólum, til sølu.
*Tlf. 310144*

**KOYRISTÓLUR**
Lítið brúktur koyristólur við posa, hann er í sera góðum standi, bert 1200 kr.
*Tlf. 320880 ella 226256*

**TIL SØLU**
Træ grulvigarður við teppi til sølu.
*Tlf. 441804 eftir kl. 18*

**TIL SØLU**
Combi barnavognur BMO. Hevur regnhettu og flugunet, 1200 kr. Barnasong við tveimum madrassum, ljóst træ 750,- kr. Baðikar við borði 400,- kr.
*Tlf. 267315*

## Bátaútgerð

**ÍSLENDSK »BELTIR«**
Línurenna við 31 stokkum, bíliga til sølu.
*Ring 220422*

**SÓMI 800**
Væl útgjørdur, Volvo Penta 230 HK diesel, gev eitt boð.
*Tlf. 423341/212218 og 288299*

**MOTORUR TIL SØLU**
Ein MWM 606-6K, 485 HK, gear Finnøy G27 og skrúvuaksil.
*Tlf. 723210*

**YNSKIST**
Glastrevjabátur millum 26–30 fót við ella uttan fiskiloyvi ynskist. Alt hevur áhuga.
*Tlf. 250950 ella 507311 eftir kl. 17*

**BÁTUR TIL SØLU**
Ein útróðrarbátur, við fiskiloyvum og íslansdloyvi, í bólki 4A til sølu um hóskandi boð fæst. Báturin er yvir 120 kubikk.
*Tlf. 312238*

**TOSKATRÁÐA VIÐ ØLLUM**
Hjól, tráða, pilkur og eskja full av beitum, húkum og tilgjørdari útgerð. Væl viðfarið. Til sølu fyri 1.200,-
*Tlf. 215000*

**PIONER JOLLA TIL SØLU**
Pioner jolla við dupultum botni við 6,5 hesta Evinrude leysamotori, er til sølu.
*Tlf. 373278*

## Bingo

**BINGO**
verður í Støkkhøllini leygardagin 17. apríl kl. 16. Nógvir góðir vinningar so sum turr grind og spik, fiskamatur, før. kjøt o.a. Á lutaseðli: Balja við fiskamati, før. kjøt o.a.
*9C*

**B36**
Bingo verður sunnudagin 18. apríl kl. 16.00 í B36-húsinum.
*B36 piltar og gentur*

**GOTT BINGO**
verður í TB-húsinum tórskvøldið 15. apríl kl. 19.
*Tvøroyrar Bóltfelag*

**GOTT BINGO**
verður í Róðrarneystinum á Argjum 15. apríl. Nógvir góðir vinningar, full pláta 400 kr. gávukort, tó 6-12 spæl full pláta 500 kr. gávukort. Á lutaseðli 2 x 500 kr. gávukort. 1 x 1000 kr. gávukort. Eykaspæl, koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*AB stuðlar*

**GOTT BINGO**
Gott bingo verður í Pálsstovu mánakvøldið 19. apríl, kl. 19.00. Nógvir góðir vinningar. Høvuðsvinningar á lutaseðlinum eru m.a. ein apexflogferðaseðil við Atlantic Airways og turr krov. Eisini verður Bingola. Koyring heim aftaná.
*Astma- og Allergifelagið*

**EB/STREYMUR**
Árliga BINGO verður Kristi Himmalferðardag 20. mai.
*EB/STREYMUR*

**SUÐUROYINGAR**
Gott bingo verður í skúlahøllini í Trongisvági mánadagin 26. apríl kl. 19, nærri lýst seinni.
*Tvøroyrar Svimjifelag*

**BINGO**
verður í VB-húsinum 28.4.2004.
*Meinigheitshúsið í Vági*

**GOTT**
verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 19. apríl kl. 19. 12 plátur 100 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á 1000 kr. Drigið verður millum spølini. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Glæman*

## Bøkur

**SALMONSENS**
store leksikon 2. udg. 1915 i brunt læder 1-26 kr. 2.600,-
*Tlf. 443402*

## Burturm. /funnið

**PÆTUR???**
Tú, sum av óvart tók stóra, bláa baðihandklæði mítt, við áseymaðum navni á, í svimjihøllini í Havn, vinarliga ring
*tlf. 509682*

**BRILLUR BURTURMISTAR**
Barnabrillur burturmistar 2. apríl á strekkinum Klokkaragøta/-Býarbókasavnið. Finnarin verður biðin at ringja
*tlf. 321576*

**FARTELEFON FUNNIN**
Samsung fartelefon funnin í Havn.
*Tlf. 509998*

**BURTURMIST**
Hevur nakar funnið mína mannfólka/silvur hálsketu, sum eg misti 20. februar, so vinarliga ring
*tlf. 252623*